# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Fimta tapið á rað til Holst

Fimm tap á rað. Tað er status eftir at Silkeborg aftur tapti um vikuskiftið. Hesaferð var mótstøðuliðið AGF, sum á ongan hátt imponeraði. Kortini eydnaðist tað teimum at vinna 4-1 á útivølli. Christian Lamhauge Holst var á vøllinum til tað restaðu níggju minuttir. Føroyski landsliðsleikarin var eisini maðurin aftanfyri okkurt vandamikið álop hjá Silkeborg, sum tað kortini ikki spurdist meira burturúr. Silkeborg hevði annars hagtølini við sær undan dystinum, tí AGF hevur ikki vunnið í Silkeborg síðani 1997, og av teimum seinastu 16 dystunum hevur Silkeborg vunnið 13. Silkeborg liggur nú nummar átta í deildini við 40 stigum, átta stig fleiri enn Sønderjyske, sum liggur beint undir niðurflytingarmarkinum.

# Hálvt marathon

Leygardagin kl. 17.00 skipaði Bragdið fyri FM í ½-marathon í Havn. Byrjar og enda bleiv á Bursatanga. Teinurin, sum bleiv runnin leygardagin, er tann sami, sum seinnu árini í samband við FM í ½-marathon, mestsum á sløttum niðan um Café Nátúr og út til Tyrlupallin at venda. Hesin teinur skal rennast 5 ferðir. Líkindini at renna vóru sum heild sera góð, tó at tað var eitt lítið heldur kaldligt høgættarlot. Umframt, at renningin leygardagin var ein FM-kapping, so var hetta eisini ein opin kapping.

## Úrslit frá FM ½-marathon í Havn leygardagin:

### Kvinnur opin bólkur (f.-1993)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.45.02 | **Helga Súsanna Johansen** | 1981 | Treysti |
| 2 | 1.46.48 | Linda Skorheim | 1982 | Bragdið |
| 3 | 1.49.08 | Krista Nielsen | 1966 | Bragdið |
| 4 | 1.50.10 | Barbara Christophersen | 1980 | Bragdið |
| 5 | 1.50.12 | Sigrid Bjartalíð | 1972 | Treysti |

### Kvinnur veteranar (f.-1964)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.54.03 | **Lydia Gardar** | 1962 | Bragdið |
| 2 | 1.55.45 | Susan Jacobsen | 1964 | Treysti |
| 3 | 2.00.02 | Karin K. Petersen | 1964 | Treysti |

### Menn veteranar (f.1955-1964)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.18.41 | **Regin Zachariasen** | 1960 | Bragdið |
| 2 | 1.19.01 | Borgar Biskopstø | 1962 | Treysti |
| 3 | 1.27.11 | Absalon Hansen | 1959 | Bragdið |
| 4 | 1.28.42 | Andrass Joensen | 1963 | Bragdið |
| 5 | 1.31.58 | Jógvan Thomsen | 1960 | Bragdið |

### Menn superveteranar (f.-1954)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.33.14 | **Jens. R. Weihe** | 1947 | Frælsi |
| 2 | 1.33.21 | Óli Olsen | 1949 | Bragdið |
| 3 | 1.49.22 | Gunnar Simonsen | 1952 | Treysti |
| 4 | 2.00.20 | Holger Arnbjerg | 1951 | Bragdið |
| 5 | 2.08.16 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið |

### Menn opin bólkur (f.-1993)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 1.17.51 | **Gudmundur Joensen** | 1983 | Bragdið |
| 2 | 1.18.31 | Sam Vang | 1970 | Bragdið |
| 3 | 1.18.35 | Eirikur Hansen | 1980 | Bragdið |
| 4 | 1.18.41 | Regin Zachariasen | 1960 | Bragdið |
| 5 | 1.19.01 | Borgar Biskopstø | 1962 | Treysti |



*Gudmundur Joensen, vann gull hjá monnum*
*Mynd: Savnsmynd*